betri trygging

# Trygging fyri álop á netinum

*Skjal við upplýsingum um **tryggingina fyri álop á netinum.***

Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingarnar um tryggingina. Tá ið skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú ert altíð vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600, um tú hevur ivamál ella vilt hava nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

**Tryggingin fyri álop á netinum** er ein heildarloysn, ið er býtt sundur í seks ymsar dekningar. Hon tekur sostatt væl samanum ymsu vandarnar fyri álopum í talgilda heiminum.

## Hvat dekkar tryggingin?

Tá ið tú teknar eina trygging fyri álop á netinum, fært tú eina heildarloysn við øllum dekningunum, sum eru nevndir í skemanum niðanfyri. Tú fært eisini atgongd til átaksliðið av altjóða telduserfrøðingum, sum er til reiðar at hjálpa, um tú ert fyri álopi ella um tú hevur illgruna um álop.

Tryggingarupphædd og sjálvsábyrgd verða mett í hvørjum føri sær og síggjast í tryggingarskjalinum.

### Dekningar

Í tryggingini eru hesir dekningar:

- ✓ **Rakstrartap**
- ✓ **Ábyrgd av at missa viðkvæmar persónsupplýsingar** eitt nú útreiðslur til at boða kundunum frá hendingini.
- ✓ **Ábyrgd fyri vantandi nettrygd** t.e. endurgjald mótvegis triðja parti ísv skaðar, sum standast av vantandi trygd á netinum.
- ✓ **Miðlaábyrgd** t.e. endurgjald til triðja part, sum líður skaða á umdømið.
- ✓ **Miss av egnari dáta** t.e. útreiðslur til at endurskapa dáta og fáa virksemið í gongd aftur.
- ✓ **Avnoyðsla** útreiðslur fyri at fáa dáta aftur.

### Hvat dekkar hon ikki?

Her eru nøkur dømi um hvat Netálopstryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjaða listan sært tú í tryggingartreytunum.

- ✕ Brot á einarættindi ella handilsloyndarmál
- ✕ Mál, sum leiðslan visti um, tá ið tryggingin varð teknað
- ✕ Kríggj, krígsgerðir osfr.

### Eru avmarkingar í dekningum?

Tryggingin dekkar tað, ið kann bólkast undir ein av nevndu dekningunum. Skaðar, ið fella uttanfyri hesar bólkar, fevnir tryggingin ikki um. Niðanfyri eru nøkur dømi um avmarkingar í dekninginum. Legg til merkis at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjaða listan sært tú í tryggingartreytunum:

- ! Streymslit ella skaðar á tól og útgerð, sum elva til, at KT skipanin gerst óvirkin
- ! Bøtur, sum ikki kunnu tryggjast
- ! Netbankastuldur
- ! Um fyritøkan ikki lýkur ásettu KT-trygdarkrøvini

betri trygging

# Trygging fyri álop á netinum

*Skjal við upplýsingum um **tryggingina fyri álop á netinum.***

## Sjálvsábyrgd

Sjálvsábyrgdin sæst á tryggingarskjalinum.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, og tryggingin verður endurnýggjað árliga. Legg til merkis, at dekningurin fyri rakstrartap ikki tekur við, fyrr enn 12 tímar eftir, at tryggingin er teknað.

## Nær og hvar gjaldi eg?

Dagfestingin, tá ið tryggingin skal endurnýggjast, er nevnd í tryggingarskjalinum. Nakað undan hesi dagfesting fær fyritøkan rokning sendandi frá Betri Trygging fyri komandi árið.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tryggingin kann sigast upp í seinasta lagi ein mánað undan næstu endurnýggjan. Í tryggingarskjalinum sæst, nær tryggingin skal endurnýggjast.

## Hvørjar skyldur havi eg?

Fyritøkan skal hava neyðuga KT-trygdarútgerð, og trygdaravrit skal takast av dátunum við jøvnum millumbilum.

Boða Betri Trygging frá sum skjótast, um fyritøkan er fyri netálopi – ella tá illgruni er um, at onkur hevur fingið atgongd til upplýsingar í skipan tykkara.

**Betri Trygging P/F**
P/F Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Tel. + 298 348 600
betri@trygging.fo
**www.betri.fo**